**Samstarv við POLITIKEN**
Sosialurin samstarvar við danska blaðið, Politiken. Niðanfyri er brot úr grein, sum stóð í blaðnum í samband við danska valið. Kanska viðkomandi nú løgtingsvalið nærkast

# Kirkjan ger mannamun

**Kvinnuligir prestar verða útsettir fyri mismuni og happing, uttan at nakað verður gjørt fyri at steðga hesum, og almenningurin skilir ikki undarligu viðurskiftini í donsku fólkakirkjuni. Kunnu vit fáa eina frágreiðing.**

TÍÐINDAGREINING
*Anna M. Sørensen*

Politiken vakti ans, tá vit spurdu allar kvinnuligu prestarnir í Danmark um javnstøðu. Tað var heldur ikki løgið, tí svarini avdúkaðu, at danska fólkakirkjan hevur ein undirskóg við mannamuni, happing og niðugering mótvegis kvinnuligum prestum. Serliga áhugavert er tað, at leiðararnir í kirkjuni – bisparnir – ikki hava minsta varhuga av, hvat gongur fyri seg ella taka í øllum førum ikki trupulleikan serliga tungt.

Hetta hava bisparnir nú bøtt uppá, halda teir sjálvir. Á tíðindafundi fyri stuttum tóku teir frástøðu frá happingini og kravdu, at mannligu prestarnir samarbeiddu og lótu vera við at happa. Fínt. Men er tað nóg mikið? Er tíðin ikki búgvin at eftirkanna alla framferð kirkjunar?

Hendingarnar seinastu mánaðirnar vísa jú, at folkakirkjan í stóran mun livir í einari farnari tíð. Einari tíð, tá eingin eftirlýsti frágreiðingum, tí øll vóru samd um at verja sjálvt teir løgnastu hugburðir og siðvenjur. Við tí eina endamáli at halda saman upp á eina kirkju, har stríð av øllum slagi var av tí ónda.

Í 1948 var rumbul, tá Fólkatingið viðtók, at kvinnur eisini kundu verða prestar. Helvtin av prestunum hóttu við at ríma og fingu síðani kroyst nøkur margháttlig serrættindi ígøgnum. Tá tað kom til stykkis, vigaðu tænastubústaðir, almennar lønir og pensiónir meira enn mótstøðan ímóti kvinnuligu starvsfeløgunum. Kortini kravdu teir ávís serrættindi.

Í eini tíð tá fleiri røddir í almenna kjakinum krevja, at danskir muslimar geva eina frágreiðing um tað, sum vit onnur uppfata sum kvinnukúgandi religiøsar siðvenjur, er upplagt at vit eisini hyggja eitt sindur at okkum sjálvum. Eru vit sjálvi lýtaleys á hesum økinum?

Sambært kanningini hjá Politiken er svarið nei. Ótrúliga nógvir kvinnuligir prestar hava upplivað manglandi virðing fyri tí arbeiði, tær gera.

Umframt dømi um beinleiðis neisir í gerandisdegnum, má tað eisini kennast niðurgerandi, at ein bispur higartil hevur loyvt, at mannligir prestar ikki vilja taka í hondina á kvinnuligum starvsfeløgum, tá hesar verða innsettar. At tað framvegis verður góðtikið, at mannligir prestar ikki vilja standa við altarið ella nema við somu Bíbliu sum ein kvinna í prestakjóla. Og at ein lóg frá 1978 framvegis loyvir meinigheitsráðum at frávelja kvinnuligar prestar.

Alt hetta við ávísing til at 10 til 15 prosent av mannligu prestunum hava eitt so tætt samband við apostulin Paulus, at teir halda, at hansara 2.000 ára gamli hugburður til kvinnur framvegis eigur at ráða. Paulus helt ikki, at kvinnur kundu vera »lærarar«, tað vil siga prestar, og at tær



*»Himmalski« kynspolitikkurin er reinur Via Dolorosa fyri kvinnuligar prestar*

*Tekning: Per Marquard Otzen*

annars áttu at tiga í meinigheitini.

Tað er ein útbreiddur hugburður í fólkakirkjuni – eisini millum kvinnuligu prestarnar – at rúmd innan kirkjuna er virðismikil – hóast kvinnuligu prestarnir eru ósamdar, um tað skal vera pláss fyri ovurvíðgongdu mannligu prestarnar. Hinvegin stendur restin av samfelagnum undrandi um støðuna í fólkakirkjuni.

Tað kann gott vera, at tað er í lagi, at kirkjan er rúmlig, og at tað eisini skal vera pláss fyri teim monnum, sum ikki halda, at tað skal vera pláss fyri kvinnum. Men leiðsla fólkakirkjunar skyldar almenninginum eina frágreiðing um, hví. Tað er ikki longur nóg mikið bara at vísa til gamlar siðvenjur, og at kirkjan ikki má fara í tvíningar. Tí hví ikki, tá partar av kirkjuni eru púrasta afturúrsilgdir í samband við javnstøðu.

Fólkakirkjan kann gott venja seg við at svara heilt rationellum spurningar um sínar heilt órationellu siðvenjur. Hetta verður uttan iva torført fyri kirkjuna at venja seg við, men her gerst ikki annað. Tí um samfelagið ikki skilir ella tekur undir við tí, sum gongur fyri seg, so er jú ikki longur talan um eina fólkakirkja, sum ein kvinnuligur prestur orðaði tað herfyri.

Kanning okkara vísir, at 45 prosent av kvinnuligu prestunum halda, at kynjamismunurin er ein innanhýsis trupulleiki hjá kirkjuni, sum má viðgerast og loysast innanhýsis. Men hvat merkir orðið »innanhýsis«, tá 82 prosent av borgarunum eru limir í fólkakirkjuni og gjalda kirkjuskatt? Sjálvandi hava limir loyvi at hava eina støðu og at blanda seg. Tað er í roynd og veru ein gomul donsk siðvenja. Vanliga nevnd demokrati.

*Týtt: Dorit Hansen*

Tíðargreinin

# … Ayaan Hirsi Ali: Prísurin fyri frælsi

Sum eingin annar hevur hon tikið upp aftur upplýsingartíðina vegna seg sjálva og nágreiniliga kortlagt hvønn ein sentimetur á tí geil, ið skuldi føra hana út úr tí moralska og vitborna oyðilandinum, sum er siðbundið islam.

Av hesum er tað hennara grundliggjandi sannføring, at »vesturlendsk virði« sosum frælsi og rættvísi eru veraldarvíð; at Evropa hevur klárað seg væl betri enn onnur øki, av tí at tað hevur tryggjað frælsið at hugsa og kjakast, ið er ein fortreyt fyri markleysari menning.

Hinvegin, so heldur hon lítið um, at evropeiski vinstrivongurin fullkomiliga ryggleyst skoðar muslimar sum offur; sum ein bólkur, sum ikki skal vera fyri atfinningum av ótta fyri hvussu teir fara at svara aftur. Men ikki at fara við teimum sum javnbjóðis samtalsfelagar, er nettupp at halda teir fangaðar í síni egnu stillstøðu.

Í Infidel skrivar Hirsi Ali um tørvin á einum muslimskum Life of Brian. Hon heldur, at alt, sum kann skúla og upplýsa fjøldina, er heimilað; eisini tá ið tað fær slíkan baksláttur sum keiputekningarnar av Muhammed.

Við ein fyrilestur í lærda háskúlanum í Berlin í 2006 vardi hon eisini rættin at spotta. Hon fordømdi dirvisleysar miðlastjórar sum »mediocre of mind« fyri ikki at vísa sínum lesarum og hyggjarum tekningarnar.

Hon prísaði hinvegin teir miðlastjórar, sum vístu tekningarnar, og ikki vóru bangnir fyri tí ótolsemi, nógvir muslimar fóru at vísa teimum. Hon segði: »Eg fari ikki fummisliga eftir at niðra átrúnaðarligan hugsanarhátt, men eg vil ikki geva meg undir harðræði. At krevja av fólki, sum ikki taka við læru Muhammeds, at tey skula lata vera við at tekna hann, er ikki ein umbøn um umhugsni, ella virðing, men eini kravboð um undirgivni.«

Við Infidel er tað trupult at yvirmeta hennara dirvi. Sum Christopher Caldwell skrivaði í New York Times: »Voltaire did not risk, with his every utterance, making a billion enemies who recognized his face and could, via the Internet, share information instantaneously with people who aspired to assassinate him.«

Íkomna støðan er av sonnum órættvorðin. Hirsi Ali varð av Zalm yvirtalað til at bjóða seg fram sum valevni til parlamentið og at verða heimsins mest sjónligi og hataði forsprákari fyri at fría muslimskar kvinnur og siðbøta islam. Hon játtaði at koma aftur til Hollands, men við teirri treyt, at hon til einhvørja tíð og hvar enn hon fór skuldi fáa lívverju. Hollendska stjórnin játtaði treytaleyst.

Hirsi Ali bað í november um lívverju í eina viku—bara so at hon trygt kundi skaffa fígging til at fáa egnar lívverjar. Men hollendska stjórnin vildi ikki so mikið sum heimila henni hetta náðiliga ynski.

So, er hetta ein roynd hjá relativistiskum ræðuskítum at sissa staðbundnar muslimar av fanatiska slagnum? Ein ávaring til aðrar øðrvísi hugsandi hollendingar um ikki at elva til stríð við at tosa ov ærligt og ófalskt um eitt avoldað og óreformerað islam? Ella bert óblandað tankaloysi?

Hetta merkir, at ábyrgdin er havnað hjá okkum. Og lukkutíð finnast einstaklingar, ið ikki kunna góðtaka, at Aayan Hirsi Ali onga lívverju hevur. Við privatum intiativi frá so mætum monnum sum Salman Rushdie og Christopher Hitchens er ein innsavnan farin í gongd at